# Bónus egið sodavatn

**Bónus og Restorffs Bryggjarí hava gjørt avtalu um sodavatn við serligari Bónus-etikett**

SODAVATN
*Eirikur Lindenskov*



*Bárður Olsen, varaleiðari, og Janus S. Rasmussen, leiðari í Bónushandlinum í Havn royna »nýggja« sodavatnið*

Tey, ið vitjaðu Bónus í Havn um vikuskiftið, løgdu kanska til merkis, at eitt nýtt slag av sodavatni var at fáa. Talan er kortini ikki um eitt nýtt sodavatnsmerki, men at Bónus hevur gjørt avtalu við Restorffs Bryggjarí um at lata Restorffs sodavatn í fløskur við serligari Bónus-etikett.

– Vit hava leingi arbeitt við hesum tankanum, og tá teir á Restorffs vóru fúsir, so var leyst og liðugt, sigur Rói Ørvarodd, leiðari í Bónus. Hann sigur, at í fyrstu atløgu verður talan um Peru, Assu og Sisu. Seinni, tá Restorffs kemur við nýggju Cola, verður hon eisini at fáa.

Prísurin fyri tvær hálvlitursfløskur er tíggu krónur pluss pant, sum er ein króna, so hetta sodavatnið fæst fyri nærum helmingin av tí, ið sodavatn vanliga kostar.

Bónus hevur fýra handlar kring landið. Ein í Havn, ein á Glyvrum, ein í Klaksvík og ein á Tvøroyri. Rói Ørvarodd er leiðari fyri allar handlarnar.

Í dag fæst serliga Bónus-sodavatnið í øllum Bónus-handlunum kring landið.



*Óla-Svenn Nolsøe, stóri á Restorffs og Rói Ørvarodd, leiðari í Bónushandlunum royna »nýggja« sodavatnið*



*Í fyrstu atløgu verður talan um Assu, Peru og Sisu sodavatn við serligu Bónus-etikettini*


NÆMINGAR til Fiskivinnuskúlan

**Kundi tú hugsað tær eina øðrvísi miðnáms-útbúgving, so er Fiskivinnuskúlin rætta valið**

Skúlin bjóðar eina 3-ára yrkisgymnasiala útbúgving - Hægri útbúgving innan fiskivinnu (HIF) - sum gevur atgongd til víðarigangandi útbúgvingar og hægri lærustovnar. Men fleiri eru farin beinleiðis í leiðandi størv í vinnuni aftan á útbúgvingina.

Tey, sum heldur ynskja eina meira praktiska útbúgving, kunnu fara í læru á fiskavirkjum ella í alivinnuni. Hesir næmingar ganga støðisárið á skúlanum og skulu seinni í undirvísingargongdini í skúla í 12 vikur.

Vit eru ein lítil skúli, men umhvørvið er heimligt og hugnaligt.

**Fiskivinnuskúlin er m.a. kendur fyri:**

- Spennandi næmingaverkætlanir
- Europameistarar tvær ferðir í kappingini "European Business Game"
- Metsølu av kókibókini "Góður matur úr sjónum", sum næmingar gjørdu
- Fiskamarknaðir og spennandi uttanlandsferðir

Heldur tú, at hetta er nakað fyri teg, so ring til tlf. 424 573 og fá umsóknarblað sendandi.

Umsóknarfreistin at søkja inn á skúlan er úti ley. 15. mars.

Meira fæst at vita á heimasíðuni hjá skúlanum: www.fiskvest.fo

FISKIVINNUSKÚLIN

Fiskivinnuskúlin
Postrúm 96
350 Vestmanna
Tlf. 42 45 73
fax 42 44 28
Teldupostur:
fiskvest@fiskvest.fo


# Grýlur, bomm og tunnusláttur á Torginum

GRÝLUR
*Tíðindaskriv*



Besta grýlufamiljan vinnur familjuferð við nýggju Norrønu Leygardagin 1. mars eru allar grýlur - bæði lítlar sum stórar - vælkomnar í SMS til ein stuttligan dag. Tá skipar SMS nevnliga fyri stórum føstulávintstiltakið á Torginum og í húsinum annars. Longu kl. 10.00 hava handlarnir í SMS eina rúgvu av køtilboðum. Meira í SMS-varpinum eftir Dag & Viku fríggjakvøldið. Tá bjóða vit eisini børnunum góðgæti frá Nestlé og Pop Top frá MBM.

Kl. 11.00 fara tey bæði Angela og Hannibal at undirhalda á pallinum, og tá plaga altíð mong børn at vera og hyggja at. Beint eftir sýningina hjá teimum báðum, kunnu børnini gera bomm saman við Angelu og øðrum á Torginum. Angela hevur greitt okkum frá, at tey fara at gera fýra sløg av bommum, nevnliga við jarðberja-, vanilju-, ananas- og hindberjasmakki. Børnini sleppa sjálvi at gera bommini, klippa tey og pakka tey í posar, sum tey síðan kunnu taka við sær heim.

Kl. 13.00 verður tunnusláttur fyri børn upp til 13 ár. Tey smærru børnini, upp til 6 ár, skulu sláa eini lítla tunnu, meðan tey eldru - frá 7 til 13 ár - sleppa at sláa eina størri tunnu. Kattakongarnir fáa vinningar.

Av tí at tað er føstulávint fara vit eisini at heiðra vakrastu grýlunum, og tað ræður um at nýta hugflogið, tí vakrastu grýlurnar fáa góðar vinningar frá SMS. Kl. 14.30 verða vakrastu grýlurnar kosnar. Ikki nóg mikið við tí, so verður vakrasta grýlufamiljan eisini kosin. Vakrasta grýlufamiljan skal verða samansett av í minsta lagi einum barni og øðrum av foreldrunum ella teimum avvarðandi. Sjálvsagt, størri familjan er, stuttligar er tað. Og tað er ikki hissini av vinningi besta grýlufamiljan vinnur. Hon vinnur nevnliga eina familjuferð fyri tvey vaksin og tvey børn við bili í 4 koyggjukamarið við nýggju Norrønu. Umframt ferðina Tórshavn-Hanstholm-Tórshavn er eisini uppihald í eina vika í tveyrúms íbúð á Danlandi í Blokhus ella Hirtshals.

Eisini verða starvsfólkini í handlunum í SMS klødd út í grýluklæðir. So vit gleða okkum at síggja tykkum í SMS leygardagin 1. mars. -Eisini tykkum, sum ikki eru klødd sum grýlur.

**Skráin:**

**Kl. 10.00:** Handlarnir í SMS hava køtilboð.

Børnini fáa Pop Top frá MBM og góðgæti frá Nestlé á Torginum.

**Kl. 11.00:** Undirhald við Angelu og Hannibal

**Kl. 11.30:** Børnini kunnu gera bomm saman við Angelu og øðrum á Torginum

**Kl. 13.00:** Tunnusláttur fyri børn upp til 13 ár.

Børnini er býtt í tveir aldursbólkar: upp til 6 ár og børn millum 7-13 ár.

Kattakongarnir fáa vinning

**Kl. 14.30:** Vakrastu grýlurnar verða kosnar og fáa vinningar frá SMS. Vakrasta grýlufamiljan vinnur familjuferð fyri 2 vaksin og 2 børn við bili í 4 koyggjukamar við nýggju Norrønu til Danmarkar. Hartil er uppihald í eina viku í 2-rúms íbúð á Danlandi í Blokhus ella Hirtshals.



# Íbygdi steinurin verður fluttur

**Ein íbygdur steinur stendur í vegin fyri rundkoyringini út á Argjar. Steinurin verður ikki sprongdur – men fluttur…**

ÍBYGDUR STEINUR
*Eirikur Lindenskov*



*Enn einaferð hevur Tórshavnar Kommuna valt at flyta íbygda steinin við Velbastaðvegin. Hesaferð tí at hann stendur í vegin fyri rundkoyringini*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Á horninum Dr. Dahlsgøta/Velbastaðvegur/J. C. Svabosgøta eru teir í ferð við at gera eina rundkoyring. Henda rundkoyring skal lætta um ferðsluna millum Argir og Havnina – serliga um morgunin, tá rættuligur tøppur er í á Argjavegnum.

Men til tess at kunna gera hesa rundkoyring verða teir noyddir at taka eitt sindur av bønum hjá Landssjúkrahúsinum oman fyri vegin. Men har stendur ein stórur steinur – og hann er íbygdur, og gamalt er, at íbygdir steinar verða ikki sprongdir.

Fleiri søgur er um íbygdar steinar, sum onkur hevur roynt at sprongt – og gamalt var, at tann, ið slíkt ger, skal ikki liva árið út.

Ein av grannunum í Dr. Dahlsgøtu sigur við Sosialin, at menn fyrr hava havt ætlanir um at spreingja steinin. Tað var, tá teir í sekstiárunum løgdu vantveitingina úr Havnardali oman í Havnina. Tá skuldi leiðingin ganga júst har, sum steinurin stendur.

Tann, ið stóð fyri arbeiðinum, vildi ikki spreingja steinin, tí hann var íbygdur. Boð vóru síðani sent eftir onkrum avbygdarmanni, men tá hann frætti, at steinurin var íbygdur, so vildi hann heldur ikki spreingja steinin.

Bæði táverandi býarverkfrøðingurin, Poul Guttesen og Sverri Dahl, landsantikvarur, vóru uppi í málinum, sum tó endaði við, at steinurin varð fluttur.

Tað er eisini yvirtrúgv, ið nervar umsitingina hjá Tórshavnar býráð hesaferð, tí Boði Haraldson, býarverkfrøiðngur, sigur við Sosialin, at steinurin verður ikki sprongdur, tí hann er íbygdur.

– Vit vilja ikki beina steinin burtur, men vit fara at flyta hann. Hetta verður gjørt í samstarvi við Landssjúkrahúsið, tí hann stendur á økinum hjá Landssjúkrahúsinum, sigur Boði Haraldson.


Starv í Føroya Banka

Húsavørður

**Eitt starv sum húsavørður í Føroya Banka er hervið leyst at søkja.**

Fyrisitingardeildin varðar av bygningum bankans og fevnir hetta um umsiting og viðlikahald av 24 deildum kring Føroyar.

**Starvið**

Dagliga starvið fevnir um:

- umsjón við og viðlikahald av deildum bankans í Havnini
- at standa fyri og samskipa arbeiði við ábøtum á bygningar, innbúgv v.m
- at vera við í gerð av ætlanum fyri framhaldandi menning av deildum bankans
- at luttaka í arbeiðinum á goymsluni, ið fevnir um ordra/innkeyp og goymslustýring
- at standa fyri skjala- og vørugoymslu bankans
- aðrar fyrifallandi uppgávur, ið javnan stinga seg upp í einum livandi umhvørvi

**Førleiki**

Søkt verður eftir handverkara ella fólki við aðrari viðkomandi útbúgving, og skal tann, ið verður settur, hava góð samstarvsevnir og samstundis kunna arbeiða sjálvstøðugt. Tað er ein fyrimunur, um viðkomandi hevur útbúgving sum húsasmiður, men er hetta eingin treyt.
Er tú áhugaður, kunnu vit bjóða eitt spennandi og sera fjølbroytt starv, ið er fakliga og persónliga mennandi við góðum arbeiðsumstøðum.

**Treytir**

Setanartreytir verða avtalaðar eftir royndum og førleika hjá umsøkjara..

**Umsókn**

Hevur tú áhuga at royna nýggjar avbjóðingar, ert tú vælkomin at søkja starvið við at senda umsókn saman við viðkomandi skjølum til:

P/F Føroya Banki
Starvsfólkadeildin
Postboks 3048
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 17. mars 2003. Meir fæst at vita um starvið við at venda sær til Inga Vestergaard ella Bjarka Mohr, starvsfólkaleiðara á tlf. 311350.

FØROYA BANKI